## Saab letur aftur

Alt bendir á, at Saab Automobile fekk mønustingin, tá forstjórin í General Motors, Edward Whitacre, í gjár kunngjørdi, at tann svenska bilverksmiðjan letur aftur. Fleiri hava ligið framvið at keypa Saab, men sambært næstformanninum í General Motors, Bob Lutz, hevur einki tilboð verið nøktandi. Hann legði tó afturat, at kemur eitt nøktandi boð, meðan Saab er undir avtøku, verður tilboðið kannað. Tað ljóðar, at íløgufelagið Genii Capital í Luksenburg og Formel 1-stjórin, Bernie Ecclestone, hava hug á Saab.




## Dýrur vetur

Tann kaldi veturin í Danmark sæst aftur á hitarokningini, og sambært felagnum Dansk Fjernvarme var hitarokningin hjá einum vanligum húsarhaldi 150 krónur dýrari í desember enn í sama mánað í 2008. Felagið hvur eisini roknað út, hvat tað fer at kosta, um tað kalda veðrið fer at standa við, og eftir teirri metingini verður hitarokningin millum 200 og 500 krónur dýrari enn vanligt frá 20. desember og hendan mánaðin út. Tey, sum hava oljufýring, fáa eisini sviðan av kuldanum. Tað kemst ikki bara av størri nýtslu, men eisini av at oljan er dýrkað, sigur DR.

# Tey fáa tað at bera til

**Felagið Fresh Link, sum fór undir farmaskipasigling millum Føroyar og Skotlands fyri hálvum øðrum ári síðan, hevur fingið tað at bera til fíggjarliga. Flutningurin heim úr Skotlandi veksur, og felagið sær ljóst uppá tíðina, sum liggur fyri framman**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Kølifarmaskipið Silver Fjord, sum hevur siglt við fiski millum Føroyar og Skotland í hálvt annað ár, fær nú alt fleiri vørur heimaftur við úr Skotlandi.

Felagið Fresh Link, sum rekur farleiðina, sigur, at talan eitt nú er um fruktir og grønmetisvørur, men felagið siglir eisini heimaftur við kassum og embalasju, sum fiskurin er í, tá hann fer úr Føroyum.

Aðrar vørur, sum Silver Fjord flytir heim til Føroya úr Skotlandi, er byggitilfar, bilar, billutir, ljóðføri og flísar til álegging.

### Hongur saman

Tað var hin 7. juli í 2008, at fyrsti túrur varð sigldur av Toftum til Scrabster í Skotlandi, og soleiðis hevur rutan nú hálvt annað ár á baki.

Tá Fresh Link hevði verið virkið í eitt ár, vístu roknskapartølini, at farleiðin hongur saman fíggjarliga, og felagið kundi tá vísa á eitt avlop í rakstrinum.

Felagið hevur skrivstovu á Toftum, haðani Silver Fjord siglir ávikavist til Scrabster fríggjadag og til Aberdeen mánadag.

Tey, ið standa aftanfyri felagið, lata væl at gongdini, og tað er ikki minni áhugavert, at flutningurin heim til Føroya úr Skotlandi veksur.




*Flutningurin heim úr Skotlandi við Silver Fjord er veksandi og tey, sum standa aftanfyri felagið, eru bjartskygd um útlitini*

Stjórin í Fresh Link er Ingun Olsen, og Andreas F. Hansen er nevndarformaður.

**FAKTA**

Silver Fjord, fyrrverandi Star Saga.
Smíðað á Skála (1984).
Umbygd fyri 12 árum síðan.
Eigarar av P/F Fresh Link eru P/F Valhalla á Toftum og P/F Rainbow Seafood í Havn.



*Nevndarformaður í Fresh Link er Andreas F. Hansen, og stjóri í felagnum er Ingun Olsen*

# Vestmenningur og Fram góðan upsatúr

**Fram fekk betri prís hjá Kósini í Klaksvík, enn Vestmenningur fekk hjá Faroe Seafood í Vestmanna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vestmenningur og Fram, sum landaðu í gjár, høvdu 450.000 pund av góðum upsa tilsamans. Hendan túrin royndu teir á Munkagrunninum.

Faroe Seafood í Vestmanna keypti veiðina hjá Vestmenningi fyri 6,50 krónur fyri kilo, meðan Kósavirkið keypti veiðina hjá Fram fyri 6,75 krónur fyri kilo.



*Teir loystu eftir midnátt 2. januar og landaði í gjár 450.000 pund*

Mynd: Karstin Vang

Soleiðis fekk Fram betri prís í Klaksvík enn Fram fekk í Vestmanna.

Tummas Christophersen, reiðari, sigur, at fiskurin hjá skipunum var góður, meginparturin var 2-arar og 3-arar.

Vestmenningur og Fram loystu hendan fyrsta túrin í árinum eftir midnátt 2. januar.

Umleið 20 mans eru knýttir at vestmannatrolarunum.